**Bilar**

Nr. 138 • hósdagur • 24. juli 2003 • 77. árg.



*Eli Smith er her uppi á Hvítanesi við rullandi atelieri sínum. Mercedes-Benz kassavognurin er ein fyrrverandi kølibilur, sum hann hevur keypt úr Fraklandi. Á myndini sæst trappan upp til atelierið*

# Eli Smith listamaður – innrættað sær rullandi atelier



*Listamaðurin situr her á verandaðini og málar eitt motiv av Nólsoynni og landslagnum við Hvítanes. Málningarnir síggjast á heimasíðuni: www.eli.fo*

**Eli Smith listamaður í Havn hevur innrættað sær ein Mercedes-Benz kassavogn til atelier. Við hesum rullandi atelierinum kann hann koyra runt landið og mála nógv ymisk motiv. Hann hevur eisini møguleika at búgva í bilinum**

ATELIER
*Magnus Gunnarsson*

Fyri ein listamann í Føroyum man tað vera sum at fáa ein dreym uppfyltan at hava sítt egna rullandi atelier. Hóast land okkara ikki er so stórt, eru her óteljandi møguleikar hjá teimum sum t.d. fotografera og mála, bæði hvat viðvíkjur landslagnum, ljósinum og teimum skiftandi litunum.

Eli Smith í Havn er ein av okkara virknu listamonnum. Í fjør keypti hann sær ein brúktan Mercedes-Benz kassavogn úr Fraklandi, sum hann hevur innrættað til atelier. Hann hevur t.d. sett eitt takvindeyga í, sum gevur gott arbeiðsljós. Fyri at hava nokk av plássi á veggjunum til at hanga málningar á, hevur hann smá kúgveygu á síðunum, til útluftning tá hann málar við oljumáling. Inni í kassanum hanga fleiri málningar. Har er eisini ein gassovnur, gasskókiútgerð, køliskáp og vask. Úti á verandaðini hevur hann innrættað eitt wc. Mercedes bilurin, ið er frá 1986, er ein fyrrverandi kølibilur, t.v.s. at veggirnir í kassanum eru væl isoleraðir.

Eli sigur at endamálið við at hava ein slíkan bil, er, at hann kann fara til nógv ymisk støð at fáa íblástur, royna seg og eksperimentera í friði. Bilurin hevur eina veranda, har hann kann sita og mála, eisini um tað regnar. Úthangið á kassanum er so stórt, at hann kann bakka bilin út yvir kaikantin og sita á verandaini og fiska, samstundis sum hann kann ganga niður á keiina eftir eini stáltrappu.

Eli hevur eisini ætlanir um at fara uttanlands við bilinum, sum t.d. til Frakland og Spanien fyri at fáa nýggj hugskot og íblástur. Tá vit hittu Eli, var hann á veg til Saksunar saman við familjuni, har skuldu tey brúka bilin sum summarhús. Kassin er soleiðis innrættaður, at øll familjan kann búgva í bilinum. Eli hevur sett ein eyka akkumulator í bilin til ljós inni í atelierinum. Børnini hjá Eli duga eisini væl at tekna og mála, so rullandi atelierið er nakað til alla familjuna.

Tey, sum eru áhugaði í at síggja tað sum Eli hevur málað, kunnu hyggja inn á heimasíðuna: www.eli.fo



*Eli Smith í hugnaliga atelierinum við fleiri av málningum sínum*




*Marni Nattestad, sølumaður hjá Ivan Johansen Bilum, við nýggja Mercedes-Benz ML 400 CDI*

# Mercedes ML – í klassa fyri seg

**Á bilasøluni, Ivan Johansen Bilar, hava teir nú fingið tann fyrsta Mercedes-Benz ML. Bilurin hevur verið gjørdur í USA síðan 1997. Nú verða teir eisini gjørdir í Eysturríki til evropeiska marknaðin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Mercedes-Benz ML er ein bilur, sum fleiri aðrar bilverksmiðjur hava brúkt sum fyrimynd. Bilurin hevur verið gjørdur í USA síðan 1997. Í 2000 fingu teir eina "facelift", tá teir t.d. fingu nýggjar lyktir, kúfangarar og blivu meira luksuskendir innan. Nú verða teir eisini gjørdir í Eysturríki til evropeiska marknaðin. Í USA er høvuðskappingarneytin BMW X5. ML er ein bilur við góðum koyrieginleikum, og eini fjaðraskipan sum ger, at bilurin er sum ein persónbilur at koyra. Bilurin hevur ikki fastar akslar, men øll fýra hjólini er óbundin hvørt av øðrum. Eisini hevur hann nógvar hentleikar til koyring uttan fyri vanliga koyrivegin, sum t.d. á ósløttum og brøttum undirlendi. ML hevur t.d. permanent trekk á øllum fýra hjólunum og 4ETS traktion-skipan, sum ger at um eitt, tvey ella trý av hjólunum missa vegtakið, syrgir skipanin fyri at bremsa teimum hjólunum, sum hava mist vegtakið og styrkja momentið á teimum hjólunum sum hava "fast undir fótum". Skipanin gevur eisini aðrar fyrimunir t.d. í svingum. Eisini hevur ML eina aðra skipan,"Low Range", sum hjálpir væl til, tá bilurin skal niðan gjøgnum brættlendi og eisini í omanbrekku, tá bremsar og stýrir hann væl, hóast okkurt av hjólunum missir takið á vánaligum undirlendi. Stóra fríhæddin ger eisini sítt til, at bilurin klárar seg so væl.

## Standard og eykaútgerð

Í hesi nýggjastu útgávuni er Mercedes-Benz ML vorðin ein sannur luksusbilur, serliga innan, har er alt, sum man kann vænta sær av einum slíkum bili. Klimaanleggið kann stillast, soleiðis at hitin ikki er eins hjá teimum, sum sita aftan og framman. Trygdarútgerðin er innbygd í bilin sum t.d. hevur elektroniska stabiliseringsskipan, (ESP), elektroniskan bremsuassistent (BAS), elektroniskan bremsukraftdeilara (EBV) og airbag framman, í síðunum og gardinairbag. ML hevur nógva útgerð sum standard, men hann fæst eisini við hópin av eykaútgerð, sum t.d. Parktronic, sum sendir ultraljóð-signal, soleiðis at bilførarin altíð veit, hvussu nær hann er við nærmasta bil ella aðra forðring, eisini fæst hann við Bi-xenon forlyktum og eini framkomnari Bose-Sound skipan við 9 hátalarum. Motorurin í hesum bilinum er ein 4,0 litur V8 við 250 hk.



*Í nýggjastu útgávuni er ML meira luksuskendur innan*

### Mercedes-Benz ML 400 CDI

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 4,0 litur V8 turbodiesel við 250 hk |
| 0-100 km/t: | 8,1 sek |
| Dekkstødd: | 275/55-17 |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 459,0 cm |
| Breidd: | 183,0 cm |
| Hædd: | 178,0 cm |
| Eginvekt: | 2335 kg |
| Totalvekt: | 2870 kg |
| Viðførisrúm: | 613 litrar |
| Prísur: | Kr. 332.000,- fyri (ML270 CDi) uttan MVG |
| Søluumboð: | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 313666<br>www.ivan.fo |




*Mercedes-Benz ML er ein bilur, sum fleiri bilverksmiðjur brúka sum fyrimynd*

## Sjey-trins automatgirkassa



Mercedes-Benz koma nú við heimsins fyrsta sjey-trins automatgirkassa, 7G-Tronic, ið kemur ístaðin fyri núverandi fimm-tins girkaasan. Girkassahúsin er úr magnesium og gevur munandi betri bensinøkonomi

*Kelda: Motor Magasinet*

## Mondeo nýggjan motor



Í sambandi við at Ford Mondeo nú fáa eina "facelift", kemur bilurin við einum nýggjum 1,8 litur Duratec SCi bensinmotori við 130 hk og beinleiðis innspræning. Motorurin lýkur tey strongu ES krøvini til dálking, sum koma í gildi í januar 2005

*Kelda: Motor Magasinet*

## Audi V6 diesel



Audi hátíðarhalda í hesum døgum, at teir hava framleitt hálva millión V6TDI motorar síðan 1997. Samstundis verður sagt frá, at hesir motorar nú lúka tey strongu EU 4 krøvini, sum koma í gildi í januar 2005

*Kelda: www.audi.dk*